

Óli Jacobsen
olijacobsen@post.olivant.fo

ariska Peter Jensen, sum legði grundarlagið fyri mjólkaforsýning og fráhaldsrørslu. Hann var tá blivin gamal, men stakk inn á gólvið viðhvørt.

Nú hevði so sonurin tikin við, hann var so einastandandi at arbeiða hjá. Tey gjørdust so væl, at Carl seinni varð boðin í brúdleyp hjá Gunnvør.

Fyrst kom Gunnvør at arbeiða í vaskarínum. Tað var nevniliga eisini ein uppgáva hjá meiarínum at vaska klæðini hjá hermonnunum. Tey blivu eisini reinsað og strokin.

Síðan fór Gunnvør at arbeiða í »kryddarínum«. Tað var nevniliga eisini ein partur av virkseminum hjá meiarínum at framleiða ymisk kryddarí. Teir gjørdu forrestin eisini sápu. Hetta eru alt framleiðslur, sum er søga í dag.

Seinni fór Gunnvør í mjólkaútsøluna. Tá var einki sum æt mjólkapakkar. Fólk møttu upp við spann og fingu mált ynskta litratalið í spannina. Tað kundu vera langar bíðirøðir. Eina ferð, tað var ein slík long bíðirøð, bumbaðu týskarar úti í Sandagerði. Húsið skakaðist, ljósið slóknaði, og fólk fóru við hvør sínari spann rennandi í allar ættir. Gunnvør skundaði sær at fáa uppí sína spann, so fór hon eisini til stroks.

So vítt Gunnvør minnist kostaði ein litur av mjólk 50 oyru tá í tíðini.

## Norman kemur aftur og farið verður til Bretlands

Men Norman gloymdi ikki gentuna í Føroyum. Hann kom aftur til Føroya aftaná kríggið. Tá var eingin ivi um, at tað skuldi verða tey bæði. Tey giftust og hildu brúdleyp heima hjá mostrini Oluffu.

Norman vildi sjálvsagt hava Gunnvør heim við sær til Bretland. Men kortini var tað ringt at fara frá øllum heima.

Tey fóru í januar 1947, so hetta var teirra brúdleypsferð. Tað vóru fleiri føroyingar við henda túrin. Gunnvør var kortini ikki millum tær fyrstu føroysku konurnar, sum fóru til Bretlands.

Tey fóru við einum fraktskipi, sum æt »Banan«, og leiðin lá til Glasgow. Sjálv hevði Gunnvør ikki verið uttanfyri Borðuna áður, so tað var spennandi at leggja út í hav, hóast veðrið var av tí allarringasta hetta kvøldið. Men veðrið batnaði longur suður tey komu.

So nærkaðust tey endiliga Glasgow, men tað tók hálvan annan tíma at sigla inn gjøgnum Clydefjørðin. Gunnvør fór upp á dekkið, har hon stóð og hugdi inn móti landi. Tað var sum ein onnur verð – alt var gamalt og grátt.

Tá ið tey vóru komin í land varð farið beinleiðis niðan á tokstøðina. Har hoyrdi ein alla tíðina, at teir róptu gjøgnum hátalararnar, nær tok fóru og hvagar. Gunnvør dámdi einki hesa nýggju verðina, hon var komin inn í, sum var so nógv øðrvísi enn heima á okkara friðarligu oyggjum við ongum tokum og øðrum gangi.

Tokið ristist eisini illa, tá tað koyrdi, tað var Gunnvør heldur ikki von við. Har var eisini so nógv fólk, sum hon jú ongantíð hevði sæð áður, og sum hon ikki kundi tosa við.

Umsíðir kom eitt snartok, sum skuldi suðureftir. Við hesum tokinum skuldu tey fara til býin Preston. So skuldu tey skifta til eitt annað tok til Fleetwood, sum skuldi gerast framtíðin hjá Gunnvør. Fleetwood var fiskivinnubýur, sum nógvir føroyingar kendu, eisini beiggin Johan. Tað sýntist at taka langa tíð at koma uppá pláss, men tíbetur fekst matur í tokinum.

Tá tey komu til Fleetwood var komið til læstar dyr hjá verforeldrunum. Soleiðis var tað bara í Bretlandi. Men tá fóru tey til ein mammubeiggja Nomann, har Gunnvør var væl móttikin.

Gunnvør dugdi lítið av enskum ta fyrstu tíðina. Men tað var kortini skjótt, at tað fór at ganga framá, og hon kundi so smátt fara at tosa við øll. Gunnvør var so í Føroyum, til maðurin kom heim aftur.

Gunnvør var í Fleetwood í fyrsta umfari í tríggjar mánaðir. Tá fór hon heim aftur til Føroya, tí Norman var ikki liðugur í herinum. Hann gjørdi um hetta mundið aftur tænastu í bretska herinum í Palestina.

Meðan tey vóru í Fleetwood royndu tey at fáa nakað at búgva í, men tað var heilt ómøguligt so stutt eftir krígslok. Tey komu at búgva hjá verforeldrunum fyrstu árini til tey fingu egin hús.

Aftaná kríggið kundi ein ikki keypa so nógv, sum ein vildi. Fólk fingu skamtanarbók, sum skuldi vísast fram hvørja ferð keypast skuldi. Tað einasta, ein fekk nóg mikið av, var frukt.

Nøkur ár gingu, og tey fingu tríggjar døtur. Tey búði eitt skifti í Havn, her Norman arbeiddi á Skipasmiðjuni. Tí eru tvær av døtrunum føddar á landssjúkrahúsinum, og Lenu Højgaard var jarðarmóður. Hin triðja gentan er fødd í Fletwood.

## Buldraslig ferðing

Fleetwood er ein hugnaligur býur. Tað var bumbað í Fleetwood undir krígnum, men tó einki í mun til í Hull og Aberdeen. Hóast Gunnvør ikki dámdi so væl í fyrstuni, so lærdi hon at liva seg inn í teirra viðurskifti, sum eru øðrvísi enn okkara í Føroyum.

Henni longdist ofta heimaftur í fyrstuni. Og tíbetur kundi hon koma heim rættiliga ofta. Serliga væl lá fyri, tá føroyskir trolarar, sum lógu í Fleetwood skuldu heim. Tá gjørdi hon skjótt av.

Men tá ið skip ikki fóru úr Fleetwood mátti farast yvir á eysturstrondina á Bretlandi, so tað kundi sleppast heim við skipum, sum komu at landa ísfisk í Aberdeen, Hull ella Grimsby, hagar føroysk skip ofta komu við fiski.



Gunnvør við familju. F.v. Ann, Norman, Joan, Gunvør, Janet



Í summar hittust tey trý systkini Johan, Gunnvør og Dánjal. Tey búgva í hvør sínum landi

Men hetta kundi vera sera buldrasligt viðhvørt. Eina ferð í 1953/1954 fóru tey úr Føroyum til Grimsby við skipinum »Poppy« hjá Kjølbro í Klaksvík. Johan beiggi Gunnvør var tíbetur við, tí hetta var ein rættiligur illveðurstúrur, stormur av landsynningi. Tað tók heili tvey samdøgur bert til Hetlands. Tey búðu har frammi í lugarinum, meðan manningini búði har afturi. Gunnvør og børnini mundu doyð av sjóverki.

Umframt hetta datt »roykhanus« niður, so tey vóru við at kódna í royki, og máttu gloppa hurðina til lugarskappan í øllum illveðrinum fyri at sleppa av við roykin.

Tey fingu eisini lítið og einki at eta, tí tað vóru als ikki líkindi at koma fram í lugarið hjá teimum har afturi. Ferðin tók tilsamans fýra samdøgur.

Tá ið veðrið fór at hasa av, kom manningin fram at vita, um tey vóru á lívi!

Tá var Gunnvør so illa fyri, at hon orkaði ikki at fara í tok heim til Fleetwood, so tey leigaðu ein taxa, sum kostaði 17 pund, tað var nógv tá.

Eina aðra ferð gjørdist Gunnvør ov sein til skipið, sum hon skuldi fara til Føroyar við, og mátti hon tískil fara til hús aftur. Men so slapp hon heim við næsta farti.

## Er nú á veg til Australia

Eins og í Føroyum kom Gunnvør til Frelsunarherin í Fleetwood. Men her bleiv herurin niðurlagdur. Tá fór hon at ganga á møti hjá metodistum.

Tað hevur verið eitt neyvt samband millum Gunnvør og hennara ætt í Føroyum. Hon hevur vitjað higar og nógv hava eisini vitjað hana.

Norman gjørdist 76 ár. Hann var sera virkin, ikki minst í Reyða Krossi. Tvær av døtrunum búgva í Australien, og Gunnvør hevur leingi ætlað sær at flyta hagar. Í morgin ári fer hon á flog. Nú verður langt at koma til Føroya!

Vit ynskja henni eina góða ferð.

**Komandi partur**

Vit hava fyrr havt frásagnir um føroyskan útróður í Íslandi, og um íslendsk børn, sum komu til Føroya tá í tíðini. Vit fara at frætta um Jóa á Húsum, sum var eitt teirra.